Frændur vóru í góðum hýri, tá ið Sosialurin vitjaði teir hóskvøldið

Frændur spæla aftur

Leygarkvøldið hava Frændur sína fyrstu framførslu í hesum árinum, tá bólkurin spælir í høllini á Kambsdali

TÓNLEIKUR
Eyðun Klakstein
Myndir: Finnur Justinussen

Leygarkvøldið fer helst best umtókti føroyski bólkurin seinastu 20 árini, Frændur, at spæla til dans í høllini á Kambsdali.

Tað er leingi ímillum, at klaksvíksbólkurin fer á pallin, men tá teir gera tað, plagar nógv fólk at leita til tiltøkini hjá teimum.

Hóskvøldið vandi Frændur í Musikkskúlanum í Havn, og Sosialurin leitaði sær framvið. Har hoyrdist, at bólkurin ætlar sær at spæla allar sangirnar, sum fólk kenna frá útgávunum hjá teimum, og onkrir sangir, sum Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen hava givið út, verða eisini at hoyra.

Góð manning

Tað verða bróðurnir Eyðun og Rani Nolsøe, sum standa á odda fyri Frændum hesaferð. Afturat sær hava teir eisini fingið Terja Rasmussen, sum spældi í Frændum í áttatiárunum. Steintór Rasmusen, sum hevur havt ein týðandi leiklut í bólkinum, verður ikki við leygarkvøldið, tí hann er burturstaddur.

Umframt høvuðsmenninar í bólkinum verða eisini tríggir tónleikarar við í bólkinum leygarkvøldið, og talan er um nakrar av dugnaligastu tónleikarunum í Føroyum. Rógvi á Rógvu fer at spæla trummur, Agnar Lamhauge skal spæla bass, og Magnus Johannesen tekur sær av ljómborðunum.

Jú, vit spæla øll hittini hjá okkum, segði Rani við Sosialin

Bussur og bátur

Tað verður gjørt nógv burtur úr dansinum á Kambsdali, sum verður hildin í sambandi við stevnuna, sum er í Gøtu um vikuskiftið.

Fyriskipararnir hava skipað fyri sambandið úr Havn, har bussur koyrir úr Steinatún kl. 22.30 og heim aftur eftir dansin.

Fólk sleppa eisini úr og til Klaksvíkar, tí Alpha Pilot fer at sigla í sambandi við tiltakið á Kambsdali. Alpha Pilot fer úr Klaksvík kl. 22.30 leygarkvøldið, og hann siglir aftur um Leirvíksfjørð eftir dansin.

Fornt øl í Hornahúsinum

Borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen fegnast um, at býurin hevur fraleitt nýggja øl til ólavsøkuna

Mynd Jens K Vang

Idemaðurin og málmaðurin leska sær av við nýggja og forna ølinum MUNGÁT í Hornahúsinum hósdagin, tá nýggja ølin kom alment á marknaðin

Mynd Jens. K Vang

Leif Sørensen í høgum gastronomiskum stíli vísir fram rættir í Hornahúsinum

MUNGÁT verður nevnt í Seyðabrævinum frá 1298

Trúgvi Restorff, "the grand old man" í føroyskum bryggjaríhøpi, varð eisini í Hornahúsinum henda dagin og royndi nýggju ølina.

Dánjal Rein, kokkur, býður vinnumálaráðharranum, Bjarna Djurholm nýggju ølina

Mynd Jens K Vang

NÝGGJAR VØRUR
Jan Müller

Kappingin á føroyska ølmarknaðinum harðnar í hvørjum, og hósdagin varð enn eitt nýtt skot latið av, tá fyrstu propparnir á nýggju ølini hjá Restorffs, við tí heldur sjáldsama og forna navninum, "MUNGÁT" og við undirheitinum "Tjóðarbjór Føroya", vórðu trektir upp. Hetta hendi eisini í heldur sjáldsomum umhvørvi, nevniliga tí forna Hornahúsinum í Havn.

Hetta er liður í tí alsamt vaksandi kappingini millum føroysku bryggjaríini og eisini tað innflutta ølið. Bæði bryggjaríini royna at gera seg meira sjónlig við at koyra nýggj ølmerki á marknaðin. Tað eru bert fáar vikur síðani, at Føroya Bjór kom við tí kenda Classic á marknaðin.

Kappingin tók dik á seg, tá bryggjaríið í høvuðsstaðnum skifti eigara, og Restorffs um ólavsøkumundið í fjør kom á marknaðin við tí nýggja PILSNAR-inum. Í kjalarvørrinum á honum kemur nú MUNGÁT til hesa ólavsøkuna.

Óla Svend Nolsøe, stjóri, sigur, at MUNGÁT er ætlað sum eina karmur um serframleiðslur hjá Restorffs. Tosað varð um at gera eina myrka tunga øl, nakað líknandi GUINESS, men hildu teir ikki, at henda hóskaði til ljósu summartíðina. Ætlandi kemur ein myrk MUNGÁT á jólum. Nýggi stjórin hjá Restorffs sigur, at MUNGÁT er ein lott, frísklig øl av pilsnaraslagnum við gullstyrki. Hon hevur ein sterkan Bayerskan eftirsmakk av humluni, og eina rúgvismikla bouquet av korni. Hann heldur, at ølin hóskar væl til føroyskan mat.

Allur hugaheimurin kring MUNGÁT er tikin úr Seyðabrævinum frá 1273 og søgu føroyinga. Tað var tí eisini í hesum sambandi, at heitt varð á Jóhan H. W. Poulsen, málfrøðing um ráðgeving og hjálp.

Á samkomu fyri innbodnum, eitt nú borgarstjóranum í Havn, landsstýrismanninum í vinnumálum, ferðavinnu-stjóranum oø. greiddi Jóhan Hendrik frá upprunanum til sjáldsama ølheitið MUNGÁT. Í Seyðabrævinum verður tilskilað, hvussu nógv ein maður skal gjalda fyri vetrarvistir. Fær hann umframt mat og húsarúmd eisini MUNGÁT, te. øl, skal hann sjálvandi gjalda meira. Orðið MUNGÁT er gamalt norrønt navn. Mun hevur somu merking sum hugur, tað at leingjast eftir at fáa nakað, meðan Gát merkir tað tú fær og sum er gott. Málfrøðingurin segði, at tað var rættiliga vanligt fyrr, at føroyingar bryggjaðu sítt egna øl heima. Tað var tað, sum at MUNGÁT. Tá innflutta ølið kom varð tað kallað bjór. Jóhan Hendrik helt tað vera gott, at hetta orðið nú 700 ár eftir tað varð nevnt í Seyðabrævinum er komið aftur til heiðar og æru í Føroyum. Hann útihýsti ikki møguleikanum fyri, at orðið at munga kann stava frá hesum forna orði eisini.

Í sambandi við nýggja ølið hevur Reproz í Havn designað eina nýggja etikett.

Á samkomuni í Hornahúsinum hevði kendi føroyski kokkurin Leif Sørensen, sett saman nakrar lættar rættir, sum skulu hóska seg nettupp til eina føroyska øl av hesum slagnum. Leif Sørensen hevur útbúgving frá eini av fremstu matstovunum í Danmark.

Seint hósdagin vórðu meira enn 400 fólk boðin í Kaggan til tónleik og MUNGÁT.